Undirsjóvartunnilin:

1.200 metrar eftir

Arbeiðið við at gera undirsjóvartunnil um Vestmannasund gongur væl. Í næstum verður farið undir at gera klárt til eina rundkoyring við Leynar

TUNNIL
Heri á Rógvi

Arbeiðið við at gera undirsjóvartunnilin um Vestmannasund fór ígongd 5. september 2000. Tað var tó ikki beinleiðis nakar nýggjur tanki at gera ein undirsjóvartunnil, men eftir drúgt politiskt orðaskifti og kreppuár, so byrjaði areiðið við at gera ein undirsjóvartunnil um Vestmannasund loksins síðsta ár.

Undirsjóvartunnilin skal eftir ætlan vera 4,9 km. langur, tá hann er liðugur. Við endan av síðstu viku, so vóru tað boraðir 3.680 m. Hetta merkir, at tað í dag eru gott og væl 1.300 metrar eftir at bora.

Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri P/F Vágatunnilin sigur, at teir í skrivandi stund eru hálvaaðru viku frammanfyri tíðarætlanina. Hetta er hann eisini væl nøgdur við. Hann ásannar, at tað í vetur kunnu koma trupulleikar. Tí er tað gott, at teir eru somikið frammanfyri tíðarætlanina.

Tað verður væntandi um árskiftið, at tað verður liðugt at bora undir sjóvarmálanum, soleiðis at Vágoyggin og Streymoyggin verða knýtt saman.

Dávur Reinert Hansen sigur eisini, at arbeiðið nú er komið í eina fasta legu, og tað gongur allatíðina framá. Rivurnar, sum teir av fyrstan tíð varnaðust og mettu sum ein trupulleikar, hava víst seg ikki at vera nakar stórvegis trupulleiki.

Sum heild tykist Dávur Reinert Hansen at vera væl nøgdur við arbeiðið sum nú er.

Eisini vegarbeiðið vágamegin tykist at ganga væl. Tað verður skjótt klárt at asfaltera, og arbeiðið verður væntandi gjørt liðugt komandi vár, sigur Dávur Reinert Hansen.

Soleiðis skal ferðslan skipast við Leynar tá koyrandi verður undir Vestmannasund. Tað verður farið undir at gera klárt til rundkoyringina í næstum



Rundkoyring

Eisini streymoyarmegin skal vegarbeiði gerast. Tað er nevniliga soleiðis, at ætlanin er at gera eina rundkoyrin við Leynar. Ætlanin er at fara at gera klárt til hetta arbeiðið í næstum. Dávur Reinert Hansen vónar í hesum sambandi, at ferðslan fer at vísa fyrilit fyri teimum, sum arbeiða.

Kvinnurnar stýra

Samstundis sum Smyril Line er farið at merkja jólaferðsluna, hevur felagið sett tveir nýggjar deildarleiðarar, Talan er í báðum førum um kvinnur

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Tvær kvinnur hava tikið við sum leiðarar á hvør síni deild hjá Smyril Line, sigur felagið í tíðindaskrivi um dagarnar. Talan er um incoming deildina og flogdeildina. Nýggi leiðarin á flogdeildini loysir eina aðra kvinnu av.

Av Smyril Line verður sagt, at tey hava nógv at gera á ferðamannadeildini í løtuni. Tað er jólaferðslan, sum er farin at merkjast. Serliga eru tað føroyskir útisetar, sum tryggja sær ferðaseðil heim til jóla. Bæði við skipi og flogfari, sum Smyril Line eisini umboðar.

Sagt verður, at tey fyrr merktu størri mun á summar- og vetrarhálvárunum, enn tey gera í dag. Tað kemst fyri stóran part av, at Norrøna nú siglir alt árið, og fólk ferðast eisini alla tíðina við skipinum.

Men Smyril Line er kortini meira enn Norrøna. Eisini flogferðsluna hava tey við at gera, soleiðis at skilja, at tey selja flogferðaseðlar um allan heim.

Um veturin er tað fyri stóran part handilsferðandi, sum tey avreiða hjá Smyril Line. Stórur partur ynskir at flúgva, men fleiri og fleiri ferðast við Norrønu, tí tey vilja hava bilin við. Hetta eru ikki bara fólk, sum fara til Danmarkar í handilsørindum, uttan eisini longri suður í Europa og ynskja so at koyra sjálvi.

Incoming deildin

Incoming deildin hjá Smyril Line fekk nýggjan leiðara tann fyrsta oktober. Tað er Ann-Mari Wang, sum kemur úr starvi hjá danskari fyritøku, ið hevur sum sergrein at skipa fyri ráðstevnum, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Smyril Line.

Ann-Mari Wang hevur útbúgving sum akademiøkonomur frá Turistakademinum í Randers, og hevur síðan arbeitt í Danmark á eitt nú hotelli og ferðaskivstovu, har hon hevur havt incoming sum starvsøki.

Á incoming deildini taka tey sær av ferðafólki, sum kemur til Føroya. Vísa teimum landið og syrgja fyri, at ferðafólkið fær so fjølbroyttar og spennandi upplivingar, sum til ber. Serliga er tað um summarið, at incoming deildin hjá Smyril Lime hevur nógv á skránni.

Skráin fyri komandi summar er løgd, og verða tá 12 ymsar útferðir, sum ferðafólkið kann fara til.

Eisini hevur incoming deildin saman við flogdeildini drúgvar royndir sum samskiparar av fundum og ráðstevnum.

Og júst hetta verður nakað, sum deildin fer at leggja seg eftir at menna í framtíðini, sigur nýggi leiðarin, Ann-Mari Wang.

Flog yvir

Eisini Flogdeildin hjá Smyril Line hevur fingið nýggjan leiðara, siga tey í tíðindaskrivinum. Tað er Heidi Askham, sum tekur við eftir Anniku Andreasen, sum fer í starv á marknaðardeildini hjá felagnum. Heidi Askham hevur seinastu tvey árini verið varaleiðari á flogdeildini.

Flogdeildin hjá Smyril Line hevur verið í støðugum vøkstri øll árini, veðrur sagt í tíðindaskrivinum.

Hesa árstíðina arbeiða tey nógv við at avgreiða bólkaferðir, verður sagt. Fyri stóran part slíkar sum námsferðir hjá ymsum skúlum.

Esiini marknaðardeildin hevur nógv at gera, láta tey at. Har verður nýggj ferðaætlan gjørd til komandi ár, sum tó fer at líkjast henni, sum galdandi var í summar.

Summarferðaætlanini verður prentað í 540.000 eintøkum á 10 málum og send til 12 lond. Umframt er ein vetrarferðaætlan komin út á fýra málum í 40.000 eintøkum.

Nýggju deildarleiðararnir Heidi Askham á flogdeildini, uttast vinstrumegin, Ann-Mari Wang á incoming deildini, í miðuni, saman við fyrrverandi leiðararnum á flogdeildini, Anniku Andreasen

Mynd: Álvur Haraldsen

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá okkara elskaði maður, pápi og verfaðir

Kári Johannesen
Fuglafjørður

gjørdist sjúkur, doyði og varð jarðaður.
Tøkk fyri umsorgan og forbøn. Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu og hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið. Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Zarepta.

Familjunnar vegna
Lillian